tíðindablaðið
sosialurin
frælsi
javnaður
brøðralag

Nr. 30 ★ hósdagur 12. mars 1987 60. árg. ★ Kr. 6,00

Føroyskt bátasmíð doyggjandi handverk!

Síða 4

adidas
THOMAS DAM
Niels Finsensgøta 5 tlf.: 11403

Bilin keypa vit sjálvandi frá Bilcentrinum
DAIHATSU SUBARU
P.I. Bilcentrið
J. Brøncksgøta 15 · Tlf. 14520 15800

Vendelbo
Marmuláta 1 kg
Best og bligast og í fittari leikuspann til børnini.

FØROYA fk -OKKARA HANDIL KEYPSSAMTØKA

EITT STERKT LIÐ!
Framá Føroyar
vit styðja ítróttin
COM DATA
FAROØANE & CO
HUSBÚNI

Norðmenn harðir:

Føroyskur trolari 770.000 kr. í bót

— Suðringur tikin inn til Tromsø. Skiparin givið upp 15 t ns ov lítið.

Reiðarin í øðini: Hevnd fyri Vesttrál, ella hvat?

Reiðaríið hjá ísfiskatrolaranum Suðringi ætlar ikki soleiðis at góðtaka stóru bótina, trolarin fekk í norðurnorska býnum Tromsø mánadagin.

Skiparin á Suðringi fekk 20.000 kr. og skipið 750.000 kr. (norskar) í bót, tí skiparin hevði givið upp umleið 15 tons ov lítið.

Heri Mortensen, reiðari, sigur, at hann ætlar sær at royna málið í rættinum í Noregi. Hann heldur, at tað er púra burturvið at geva so stóra bót fyri so lítið brot. Ikki minst, tá havt verður í huga, at Suðringur verri enn so hevur fiskað kvotuna hjá sær í norskum sjógvi.

— Hetta líkist mest einari hevndargerð hjá norðmonnum, kanska fyri Vesttrál, sigur reiðarin á Tvøroyri.

Gav upp kruvdan í staðin fyri rundan

Heri Mortensen greiðir frá, at skiparin á Suðringi ringdi seinnapartin sunnudagin, um fimm-tiðina, og segði, at eitt norskt vaktarskip hevði givið honum boð um at fylgja við inn til Tromsø. Hann hevði givið skeivt upp, hvussu nógv hann hevði inni. Í norska fiskiloyvinum stendur, at gevast skal upp í ósløgdum, rundum. Men óvart hevði skiparin á Suðringi givið upp í sløgdum, kruvdum. Tað vil siga, at hann hevði givið ov lítið upp. Í Føroyum verður givið upp í sløgdum.

Tá Suðringur kom inn seint sunnukvøldið, varð boðað frá, at fólk skuldu koma umborð klokkan átta mánamorgunin. Men har kom ongin fyrr enn á middegi. Tá norðmenninir vóru lidnir at rokna, vísti tað seg, at skiparin hevði givið upp góð 10%, 15 tons, ov lítið. Suðringur hevði 1800 kassar inni.

Fingu sakførara

Síðani gav politimyndugleikin í Tromsø skipara og skipi bót. Og reiðarin fekk at vita, at rindaði hann ikki bótina, slapp skipið ikki út, fyrr enn dómur var fallin. Og hinvegin, rindaði hann, misti hann samstundis møguleikan at appellera avgerðina um bótina.

— Hetta var ein trupul støða og fólkini í Tromsø, sum høvdu við hetta at gera, vóru als ikki til at tosa við. Men vit fingu so fatur í einum norskum sakførara, sum fekk lagað tað solieðis, at skipið slapp út aftur móti bankatrygd fyri báðum bótunum, greiðir Heri Mortensen frá.

Og stutt fyri midnátt slapp Suðringur út aftur. Hann misti nógv hetta hálvtannað samdøgrið. Snoddið, sum fiskaði beint við Suðring sunnudagin, fekk 400 kassar, meðan Suðringur var í Tromsø.

Suðringur fiskar nú aftur, men teir ætla helst at gevast í dag og fara at sigla heim.

hd

Hundalív í barnagarði

síðu 13

Vit FLYTA
— skjótt úr GONGINI niðan leygardagin og mánadagin og mánadagin
NYNTHERSGØTU 4 og hava ikki opið fríggjadagin,
BECKERS MÁLING